gult22 cyan22 magenta22 svart22



# Ein dreymur

**Tá FCK tryggjaði sær gullmerkini sunnudagin, var hetta samstundis ein dreymur, sum rann út, hjá stjóranum í felagnum**

DM-GULL
*Álvur Haraldsen/
Jákup Mørk - Parken*

Í leikskránni til dystin skrivaði Flemming Østergaard, at um FCK nú gjørdist meistari, so var tað ein dreymur, sum rann út. Eftir dystin var hesin dreymur runnin út, og tað var eisini ein sera fegin Flemming Østergaard, sum vit hittu eftir dystin.

- Hetta er so avgjørt ein dreymur, sum nú rennur út hjá mær. Tá eg kom til felagið í 1997 settu vit okkum mál um, at vit skuldu gerast meistarar, og tað eru vit so eisini nú. Tað er sjálvandi nakað, sum eg eri bæði fegin og errin um.

### Heldur orð

Stjórin hevur eisini leingi verið vísur í, at tilfarið var veruliga til nakað stórt í liðnum. Tá yvirritaðu fyri einum ári síðani vóru á vitjan í Keypmannahavn, tóktist stjórin sera vísur í síni søk, tá hann segði »verða vit ikki meistarar í ár, so verða vit tað næsta ár«. Nú hetta er vorði ein staðfesting, spurdu vit hann eisini, hvørjar orsøkirnar til gullmerkini vóru.'

- Eg plagi jú at halda tað, sum eg lovi, sigur hann fyrst við einum smíli.

- Uppskriftin er fyri tað mesta hart arbeiði. Vit hava eitt sera vælvirkandi felag, og ein av størstu orsøkunum er helst, at vit undan hesum árinum fingu Roy Hodgson til felagið. Hann hevur veruliga fingið liðið at virka sum eina eind, har allir stríðast fyri hvørjum øðrum. Vit hava sjálvandi eisini stórar profilar á liðnum, so sum Toda og Zuma, men fyrst og fremst riggar liðið nú nógv betri sum ein eind.

### Stórfelag

Tað vóru eisini mong, sum ikki trúðu sínum egnu eygum, tá tað í fjør fræ ttist, at Hodgson skuldi verða venjari hjá FCK. Áður hevur hann roynt seg hjá nøkrum av veruliga stóru feløgunum í Europa, og tá hann eitt nú hevur verið venjari hjá Inter, kundi tað tykjast løgið, at hann brádliga var at síggja í FCK. Kanska eitt stórfelag í Danmark, men vanliga ikki eitt av teimum, sum roknað verður við í Europa. Spurdur um hetta, svarar Østergaard, at hesum var hann als ikki samdur í.

- Nei, vit eru eitt stórfelag. Hyggur tú at umsetningi, yvirskoti og umstøðum annars, so eru vit avgjørt millum tey stóru í Europa, segði ein væl nøgdur stjóri at enda.



- *Vit teljast avgjørt millum stóru feløgini í Europa, sigur Flemming Østergaard*

# Størsti dagurin í lívinum

**Hóast hann sjálvur varð kosin til ársins leikari, so heldur Sibosusu Zuma, at Todi Jónsson er besti leikarin á liðnum**

DM-GULL
*Álvur Haraldsen/
Jákup Mørk - Parken*

Tað er einki at ivast í, at Sibosisu Zuma var í góðum lag sunnudagin. Undan dystinum varð hann kosin ársins leikari hjá FCK, og málið hjá honum í dystinum, mundi vera eitt hitt besta í superliguni í ár.

Sjálvur hevði hann eisini ilt við at fata alt hetta, tá vit fingu orð á hann eftir dystin.

- Hetta er bara heilt ótrúligt. Í løtuni eri eg snøgt sagt alt ov spentur til at hugsa um nakað sum helst.

- Fyri meg er hesin dagurin heilt óveruligur. Alt hevur gingið upp á stás. Eg varð kosin ársins leikari og skoraði eisni hatta málið. Tað er bara heilt ótrúligt.

### Todi er tann besti

Í mun til nógvar aðrar dystir, so hevði Zuma ikki vanliga makkaran við sær frammi í álopinum. Spurdur, hvat tað er, sum ger at samspælið millum hann og Toda riggar so væl, sigur Zuma, at tað bara er nakað, sum hevur riggað væl.

- Eg veit ikki akkurát hví, men tað riggaði bara beinanvegin. Restin av liðnum hevur eisini fungerað væl, og tá verður tað lættari. Yvirhøvur haldi eg, at vit hava góðar áleyparar, og samanspælið hjá mær hevur riggað væl saman við øllum teirra.

Hetta skal tó ikki skiljast soleiðis, at Zuma ikki heldur nógv um Toda.

- Todi er kalla ein fullkomin spælari. Hann hevur skjótleika og styrki sum fáur, og eg haldi meg kunna siga, at hann er so nógv tann besti leikarin, sum vit eiga. Tað er einki sum kann steðga honum, sigur altso Sibosusu Zuma at enda.

*Eg varð kosin ársins leikari og skoraði eisni hatta málið. Tað er bara heilt ótrúligt, segði Zuma um óglymandi sunnudagin*



# Gjørt sín part

**Hóast hann ikki slapp á væøllin, so kendi Todi Jónsson seg avgjørt sum ein part av DM-gullinum**

DM-GULL
*Álvur Haraldsen/
Jákup Mørk – Parken*

Tað var ein tung avgerð, sum Todi Jónsson varð noyddur at taka leygardagin, tá tað var greitt, at eyma lær hansara ikki var nóg sterkt til at spæla dystin móti Brøndby. Eftir dystin tóktist hann tó eins fegin sum allir viðleikararnir, og hann var als ikki samdur, tá vit spurdu hann, um hetta ikki kendist eitt sindur hálvforkølað.

- Mann hevur jú verið við alla tíðina, so sjálvandi kenni eg meg sum part av hesum. Hevði eg verið við í dag, so var tað prikkurin yvir i'num, men eg haldi kortini, at eg eigi stóran part av hesum heiðrinum.

### Góður dystur

Í fleiri mánaðir hevur verið greitt, at gulldysturin móti Brøndby helst fór at verða størsti dysturin nakran tíð í donsku superliguni. At talan fór at gerast um ein av teimum dystum, sum allir spælarar droyma um at sleppa til.

- Sjálvandi hevði eg vilja upplivað hetta inn á vøllinum, men tað kundi eg so ikki. Hatta er tó stuttligt hjá teimum, sum vóru á vøllinum, men eg má so leggja afturat, at teir eisini spældu ein sera góðan dyst. Brøndby hevði jú einki at siga yvirhøvur.

Áðrenn vit sleptu Toda, spurdu vit hann, um hann visti, hvat kvøldið annars hevði at bjóða, nú gullið var staðfest.

- Tað mást tú bara ímynda tær sjálvur, var flennandi svarið, áðrenn hann slapp sær inn í skiftingarrúmið, har liðfelagarnir fyri longari tíð síðani vóru farnir í holt við eina heila røð av sigurssangum.



- *Mann hevur jú verið við alla tíðina, so sjálvandi kenni eg meg sum part av hesum, sigur Todi*

gult23 cyan23 magenta23 svart23



# Herfølge er liðugt

**Meðan Todi og teir í FCK hildu veitslu, sat ein skaddur Jákup Mikkelsen og hugdi at, tá Herfølge ruddiliga tapti seinasta heimadystin**

DANMARK
*Jákup Mørk*

Meðan tey í FCK hátíðarhildu meistaraheitið framman fyri 41.000 garvillum áskoðarum, var lagið í Herfølge øðrvísi, tá seinasti heimadysturin á árinum skuldi fáast frá hondini. Leingi var annars líkt til, at dysturin móti AB fór at verða avgerandi fyri niðurflytingarspurningin, men soleiðis var kortini ikki.

Niðurflytingin var staðfest longu í undanfarna umfarinum, og tómu áskoðaraplássini vóru nógv í tali, tá leikararnir skuldu siga farvæl við heimaáskoðararnar.

Fyri Jákup Mikkelsen gjørdist talan enntá um eitt sera skjótt farvæl, tí longu í upphitingini varð hann skaddur, og tí slapp føroyski málverjin ikki at heilsa áskoðarunum fyri seinastu ferð.

Um sjálvan dystin er annars lítið at skriva. Herfølge er niðurflytari í ár, og teir spældu eisini sum slíkir sunnudagin. Viljin at vinna var púrasta burtur, og AB leikararnir, sum veruliga hava fingið sjálvsálitið aftur, fingu sera lætt spæl í knúsandi 3-0 sigrinum.

### Silkerborg á silvurkós

Sum tað sæst aðrastaðni á hesum síðum, so er spurningurin um gullið nú avgreiddur, men dysturin um plássini beint undir FCK, er tó framegis harður.

At Brøndby tapti fyri FCK viðførdi, at Silkeborg nú stendur við bestu kortunum undan seinasta umfarinum. Teir vunnu torføra útidystin móti Viborg, sum við tapinum misti sambandið til FC Midtjylland, sum soleiðis hevur vissað sær atgongd til europeiskan fótbólt komandi ár. Ikki so galið hjá liðnum, sum fyri fyrstu ferð roynir seg í superliguni.

Sostatt skal Herfølge komandi ár spæla í fyrstu deild, har Hvidovre við Óla Johannesen telist millum mótstøðuliðini. Skal Hvidovre gera álvara av ætlanunum hjá Schmeichel um at koma fram í oddin, so skulu úrslitini tó verða betri, enn tey hava verið seinastu umførini.

Sunnudagin taptu teir í Hvidovre 3-1 fyri botnliðnum, FC Aarhuus, men úrslitið var kanska eisini ein avleiðing av, at Hvidovre ikki longu hevur nakað at spæla fyri í ár.

Tað hevur liðið hjá Atla Gregersen, Randers Frejam heldur ikki. Niðurflytingin hevur annars hótt leingi, men nú er tó greitt, at liðið eisini verður í deildini komandi kappingarár. Um tað fer at hilnast betri enn tað, sum nú rennur út, er sjálvandi ilt at siga. Tað er ein spurningur, sum ikki verður svaraður fyrr enn um eitt ár.



*Hvidovre og Óli Johannesen hava ikki longur nakað at spæla fyri, og hetta sæst eisini aftur í úrslitunum*

# Rok í Keypmannahavn

**Á leið 60 fólk eru handtikin í danska høvuðsstaðnum undir og eftir dystin millum FCK og Brøndby**

ÁSKOÐARAR
*Jákup Mørk*

Tað gekk ikki friðarliga fyri seg, tá FCK sunnudagin tryggjaði sær heitið sum danskur meistari.

Í vikuni hava donsku miðlarnir gjørt nógv burtur úr væntaða rokinum millum áskoðararnar, og tíverri tóktist sunnudagurin bert at prógva hetta.

Av politistøðini verður sagt, at megin parturin av fólkunum eru tikin fyri brot á politiviðtøkurnar. Løgreglan er annars væl fyrireikað til hendingarnar í dag. Sagt verður, at vaktarhaldið er hitt sama, sum tá Arsenal og Galatasary spældu eruopa-cup finalu í fjør.

# Sogndal tapti stórt

**Noreg: Bæði Julian Johnsson og Kurt Mørkøre vórðu skiftir inn, tá Sogndal tapti 3-0 á heimavølli ímóti botnliði**

Tað hilnaðist heilt illa hjá Sogndal sunnudagin. 1804 áskoðarar sóu á heimavøllinum Fosshaugane Tromsø, sum hevur staðið seg stak illa í fyrstu umførunum, vinna 3-0.

Málini komu í 23., 52. og 63. minutti. Tað fyrsta eftir langt innkast, og tað síðsta eftir at Jørgen Tengesdal, sum eisini hevði skorað til 2-0, kom ímillum afturlegging.

Sogndal hevði lítið at bjóða uppá, og Tromsø misnýtti brotsspark aftaná, at teir vóru komnir framum 3-0.

Hvørki Julian Johnsson ella Kurt Mørkøre vóru ímillum teir fyrstu ellivu hjá Sogndal, men teir komu báðir inn í 2. hálvleiki. Tá 35 minuttir vóru eftir, kom Julian Johnsson á vøllin fyri Kristian Ystaas, og Kurt Mørkøre varð innskiftur fyri Anders Stadheim, tá 21 minuttir vóru eftir.

# Zwolle fer ikki upp

Leygardagin spældi FC Zwolle triðja dystin í uppflytingarspælinum í Hollandi. Úrslitið gjørdist ein 1-1 javnleikur móti Telstar, og hetta merkir, at Zwolle at kalla hevur mist møguleikan fyri uppflyting. Liðið hjá Súna Olsen hevur bert fingið tvey stig í trimum dystum.

Súni Olsen byrjaði dystin á beinkinum, og varð ikki skiftur inn fyrr enn átta minuttir restaðu at spæla

**jm**

### Støðan, danska superligan

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK 32 | 16 | - | 12 | - | 4 | 54 | 27 | 27 | 60 | |
| 2 | Silkeborg | 32 | 15 | - | 11 | - | 6 | 48 | 34 | 14 | 56 |
| 3 | Brøndby | 32 | 16 | - | 7 | - | 9 | 69 | 41 | 28 | 55 |
| 4 | FCM32 | 14 | - | 10 | - | 8 | 53 | 42 | 11 | 52 | |
| 5 | Viborg | 32 | 13 | - | 7 | - | 12 | 51 | 40 | 11 | 46 |
| 6 | OB 32 | 13 | - | 7 | - | 12 | 49 | 44 | 5 | 46 | |
| 7 | AaB 32 | 12 | - | 10 | - | 10 | 49 | 49 | 0 | 46 | |
| 8 | Lyngby | 32 | 12 | - | 8 | - | 12 | 40 | 51 | -11 | 44 |
| 9 | AGF 32 | 13 | - | 4 | - | 15 | 52 | 56 | -4 | 43 | |
| 10 | AB 32 | 8 | - | 14 | - | 10 | 42 | 40 | 2 | 38 | |
| 11 | Herfølge | 32 | 6 | - | 9 | - | 17 | 39 | 64 | -25 | 27 |
| 12 | HFK Sønderj. | 32 | 1 | - | 7 | - | 24 | 28 | 86 | -58 | 10 |

### Støðan, danska 1. deild

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Esbjerg | 29 | 19 | - | 8 | - | 2 | 77 | 25 | 52 | 65 |
| 2 | Vejle 29 | 16 | - | 8 | - | 5 | 69 | 35 | 34 | 56 | |
| 3 | Køge29 | 16 | - | 8 | - | 5 | 59 | 34 | 25 | 56 | |
| 4 | Frem 29 | 16 | - | 7 | - | 6 | 64 | 33 | 31 | 55 | |
| 5 | Farum | 29 | 15 | - | 5 | - | 9 | 62 | 44 | 18 | 50 |
| 6 | AC Horsens | 29 | 11 | - | 10 | - | 8 | 41 | 36 | 5 | 43 |
| 7 | B 1913 | 29 | 11 | - | 9 | - | 9 | 40 | 43 | -3 | 42 |
| 8 | B93 29 | 12 | - | 5 | - | 12 | 50 | 45 | 5 | 41 | |
| 9 | Brønshøj | 29 | 12 | - | 2 | - | 15 | 50 | 57 | -7 | 38 |
| 10 | Hvidovre | 29 | 9 | - | 8 | - | 12 | 52 | 53 | -1 | 35 |
| 11 | Randers F. | 29 | 9 | - | 6 | - | 14 | 40 | 54 | -14 | 33 |
| 12 | Skive | 29 | 8 | - | 8 | - | 13 | 49 | 69 | -20 | 32 |
| 13 | FC Aarhus | 29 | 7 | - | 9 | - | 13 | 41 | 65 | -24 | 30 |
| 14 | Fremad A | 29 | 7 | - | 7 | - | 15 | 39 | 61 | -22 | 28 |
| 15 | Ølstykke | 29 | 7 | - | 6 | - | 16 | 36 | 76 | -40 | 27 |
| 16 | Birkerød | 29 | 2 | - | 4 | - | 23 | 39 | 78 | -39 | 10 |

### Støðan, norska tippeligan

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Viking | 10 | 8 | - | 2 | - | 0 | 24 | 9 | 15 | 26 |
| 2 | Rosenborg | 10 | 8 | - | 1 | - | 1 | 30 | 10 | 20 | 25 |
| 3 | Lillestrøm | 10 | 6 | - | 1 | - | 3 | 20 | 15 | 5 | 19 |
| 4 | Brann | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 27 | 17 | 10 | 17 |
| 5 | Molde | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 22 | 15 | 7 | 17 |
| 6 | Odd. Grenl. | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 18 | 11 | 7 | 17 |
| 7 | Stabæk | 10 | 5 | - | 1 | - | 4 | 13 | 19 | -6 | 16 |
| 8 | Moss10 | 4 | - | 1 | - | 5 | 13 | 16 | -3 | 13 | |
| 9 | Tromsø | 10 | 3 | - | 0 | - | 7 | 8 | 15 | -7 | 9 |
| 10 | Strømgodset | 10 | 2 | - | 3 | - | 5 | 14 | 24 | -10 | 9 |
| 11 | Sogndal | 10 | 3 | - | 0 | - | 7 | 9 | 23 | -14 | 9 |
| 12 | Bryne | 10 | 2 | - | 2 | - | 6 | 10 | 20 | -10 | 8 |
| 13 | Lyn 10 | 1 | - | 4 | - | 5 | 12 | 16 | -4 | 7 | |
| 14 | Bodø/Glimt | 10 | 1 | - | 3 | - | 6 | 8 | 18 | -10 | 6 |